5. desember 2024
Mál: 24/14468-1
Viðgjørt: JL

**Uppskot til**

# Kunngerð um næmingaráð

Við heimild í § 56, stk. 2 og 3 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997, sum seinast broytt við løgtingslóg nr 85 frá 16. mai 2022 verður ásett:

*Endamál*

**§ 1.** Endamálið er**,**

- at næmingarnir hava eitt stað, har teir hava høvi til at viðgera mál av felags áhuga,
- at menna samstarv og felags ábyrgd, har næmingarnir virknir taka lut og viðgera mál í eini fólkaræðisligari tilgongd,
- at tryggja, at næmingarnir verða hoyrdir í øllum málum, har fyriskipanir verða settar í verk, ið hava ávirkan á læring, trivnað og undirvísingarumstøður.

*Skipan*

**§ 2**. Í skúlum, ið hava 5. flokk og eldri floksstig, stovna næmingarnir næmingaráð.
*Stk. 2*. Skúlar, ið ikki hava næmingar í 5. ella eldri floksstigi, skulu eisini sum liður í demokratisku tilgongdini sambært endamáli fólkaskúlans geva næmingunum møguleika at stovna eitt næmingaráð.
*Stk. 3*. Næmingaráðið fremur sítt arbeiði undir ábyrgd skúlastjórans, sum tryggjar, at næmingaráð verða vald.
*Stk.4*. Skúlastjórin tilnevnir lærara ella annað starvsfólk at verða samstarvsfólk hjá næmingaráðnum.
*Stk.5*. Næmingaráðið umboðar næmingarnar á fundi við leiðslu skúlans, skúlastýri, námsfrøðiliga ráðið, kommununa og aðrar viðkomandi partar.

*Val og valskipan*

§ 3. Næmingaráðsval er á hvørjum ári í seinasta lagi hálvan septembur.
*Stk. 2*. Tvær vikur fyri valið skipa næmingaráðini fyri valfundi, har:
1) greitt verður frá arbeiðinum í farna ári
2) kunnað verður um valskipanina, uppstilling, og hvussu valið fer fram

*Stk. 3*. Næmingaráðini verða skipað í mun til skúlastødd eftir hesum meginreglum:
1) Í skúlum, sum ikki eru floksbýttir, og sum hava næmingar í 1. – 6. flokki ella færri flokssstig, verður skipað eitt næmingaráð
2) Í skúlum, sum hava næmingar í 1. – 9. ella 10. flokki, og sum ikki eru fult árgangsbýttir, verða skipað tvey næmingaráð
3) Í skúlum, sum hava næmingar í 1. – 9. ella 10. flokki, og sum eru fult árgangsbýttir, verða skipað trý næmingaráð, eitt fyri hvønn undirvísingarpart.

*Stk. 4.* Í skúlum, har undirvísing skúlans fer fram í skúlaeindum, sum hølisliga eru spjaddar í skúlaøkinum, skal næmingaráð, har tað er gjørligt, verða valt fyri hvørja skúlaeind.
*Stk. 5* Allir næmingar skúlans hava valrætt og valbæri til næmingaráðið.
*Stk.6*. Hvør flokkur velur 1 ella 2 limir í næmingaráðið sambært hesum reglum:

a) eina viku fyri valið verður uppstillingarfundur í hvørjum flokki, har valevnislisti verður gjørdur
b) limirnir verða valdir við skrivligari atkvøðugreiðslu
c) hvør næmingur hevur eina atkvøðu
d) flokslærarin hjálpir næmingunum at skipa fyri uppstillingarfundi, at gera valevnislista og tryggjar, at floksumboðini verða vald.

*Stk.7*. Næmingaumboð kann verða afturvalt, men fer úr næmingaráðnum, um viðkomandi flytir skúla ella fer úr skúlanum.

*Næmingaráðsarbeiðið*

§ 4. Á fyrsta fundi eftir valið skipar næmingaráðið seg við forfólki, næstforfólki, skrivara og kassameistara. Næstforfólkið kann eisini røkja uppgávuna sum kassameistari.
*Stk. 2*. Allar avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta. Næmingaráðið er viðtøkuført, tá ið meira enn helvtin av limunum eru møttir á fundi. Stendur á jøvnum, er forfólksins atkvøða avgerandi.
*Stk. 3*. Næmingaráðið leggur eina ætlan fyri næmingaráðsarbeiðið komandi skúlaárið og ásetur fundardagar
*Stk. 4*. Næmingaráðið hevur rætt til at ummæla øll mál, sum viðvíkja næmingunum bæði avgerðir, sum kommunan, skúlastýrið, skúlaleiðslan og landið taka.
*Stk. 5*. Næmingaráðið eigur 1-2 ferðir árliga at hoyra næmingarnar.
Stk. 6. Hugskot um ábøtur trivnaðarliga, hølisliga og undirvísingarliga verða latin skúlastjóranum, sum tekur stig í málinum alt eftir, hvør eigur uppgávuna.
*Stk.7*. Næmingaráðið kann í samráð við samstarvsfólkið og leiðslu skúlans skipa fyri ymsum átøkum at menna felagsskap og trivnað.
*Stk. 8*. Næmingaráðið kann í samráð við leiðslu skúlans og samstarvsfólkið skipa fyri valfundum og innanhýsis vali í samband við kommunu- og løgtingsval.

*Fígging*

§ 5. Skúlastjórin játtar fígging til næmingaráðsarbeiðið av árligu fíggjarætlan skúlans. Skúlastjórin umsitur játtanina.

*Høli og skrivstovuhald*

§ 6. Skúlastjórin ávísir høli til næmingaráðsarbeiðið og tryggjar, at næmingaráðið hevur neyðug amboð til arbeiði

**§ 7.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd

Barna- og útbúgvingarmálaráðið

**Djóni Nolsøe Joensen**
Landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Skjal 1**

**Heitið á skjalinum**